


**Nr. 3** ***30. januar 2022*** **82. árg.**

# Liv fyri tí, sum hevur týdning

*„… eg noyðist at lata tað vera eftir… sum eg havi vunnið við strevi mínum… undir sólini.“ Præd. 2,18–19 V.D.*

Um tú arbeiðir harðari, kanst tú tjena fleiri pengar, men tú kanst ikki tjena meira tíð. Ein væl dámdur sangur sigur: „Tíð kann vera peningur, men tín peningur kann ikki keypa tíð.“

Um tú regluliga vitjar kirkjugarðin, kann tað kanska hjálpa tær at endurmeta og raðfesta lív títt! Tað kann kanska fáa teg at steðga á og spyrja teg sjálvan, hvørjum ið tú veruliga livir fyri. Sálomon fekk eina serliga uppliving: „Tí hóast eg geri mítt arbeiði við vísdómi, skili og dugnaskapi, so má eg geva alt, sum eg forvinni, til onnur at eiga, sum einki stríð hava havt av tí.“ (*Frítt umsett.* Præd. 2,21).

Tú skalt ikki bara tjena til lívsins uppihald. Minka um tína ovurstóru arbeiðsbyrðu, sum bara hevur strongd við sær. Gevst í kappingini um framgongd.

Ger heldur ein mun millum tey, sum tú livir saman við. Handa ikki bara ein arv víðari til næsta ættarliðið, men gev eitt gott eftirmæli víðari til teirra, sum koma eftir teg. Tað vil ríka lív teirra.

Her í Vesturheiminum skava vit inn undir okkum. Vit halda tað vera natúrligt at fáa sær nýggjan køk, dýrar uttanlandsferðir, bil, bát, summarhús og eina rúgvu av klæðum. Hetta nøktar okkum eina løtu, men skjótt er tómleikin aftur har. „Tann, sum elskar pening, verður ikki mettur av peningi… eisini hetta er fáfongd (tómleiki).“ – „Sum hann kom úr móðurlívi, soleiðis má hann fara avstað aftur, so nakin sum hann kom.“ Præd. 5,9 og 14.

Fólk leypa upp á mylnuhjólið, sum melur runt og runt. Tá ið tey hava havt ein køk í eini 20 ár, so skulu tey partú hava ein nýggjan. Fáfongd og ófriður alla tíðina.

Fólk leita frá sær sjálvum eftir friði. Bíbliunnar Gud kann geva tær frið og gleði. Gud hevur eina meining og ætlan fyri lívi tínum: „Tí at eg veit, hvørjar ætlanir eg havi í hyggju við tykkum, sigur Harrin, ætlanir um frið og ikki um ógævu, til tess at veita tykkum vónríka framtíð." Jer. 29, 11.

Frelsuvegurin liggur her: „Eg eri Vegurin, Sannleikin og Lívið. Eingin kemur til faðirin uttan við mær." Jóh. 14,6. Bjóða Jesusi inn í títt hjarta sum Harra og Frelsara. „Men so mongum, sum tóku ímóti honum, teimum gav hann mátt til (ella rætt til) at verða Guds børn, teimum, sum trúgva á navn hansara." Jóh. 1,2.

*Effie Campbell* umsetti.

# Einki pappír – men kærleiki!

Ein fríggjadag seinnapart fyri góðum 2000 árum síðani fingu øll fólk eina gávu – sum vit annaðhvørt kunnu taka ímóti – ella lata vera, um vit einki leggja í hana.

Hebr. 2,3 sigur: „Hvussu skulu vit tá sleppa undan, um vit einki leggja í eina so stóra FRELSU = GÁVU?" Vanliga eru gávur pakkaðar inn í pappír, men ikki henda. Hon er pakkað inn í KÆRLEIKA. Har er eingin reyð sloyfa – men gávan er dýggjvát av REYÐUM BLÓÐI.

Tí gávan var, at Gud læt JESUS bera revsingina, sum vit øll skuldu havt. (Jes. 53,6). Frelsan er einki heiðursmerki. Gud vil ikki bøta menniskju, men føða tey av nýggjum. Jødiski farisearin Nikodemus var uttan iva ein óførur maður, sum gjørdi sítt besta fyri at vera eitt gott menniskja.

Men Jesu orð til henda mann vóru: Tú mást føðast av nýggjum. Annars kanst tú ikki síggja Guds ríki. Hesi orð eru enn galdandi líka til heimsins enda.

Nú skal eg geva tær nøkur orð afturat, sum siga, at FRELSAN ER EIN GÁVA, sum vit hvør einstakur mugu taka ímóti:

„Løn syndarinnar er deyði, men NÁÐIGÁVA Guds er ævigt lív í Kristi Jesusi, harra okkara." Róm. 6,23.

„Tøkk veri Gudi fyri sína ósigandi GÁVU." 2. Kor. 9,15.

„Av NÁÐI eru tit frelstir, við trúgv, og tað er ikki tykkum at takka, tað er Guds GÁVA." Ef. 2,8.

Gávan er pakkað inn í kærleika, ein kærleika so sterkan, at hann er dýggjvátur av blóði, blóðinum av tí slaktaða Guds lambi.

*Effie Campbell* umsetti.

# Reis teg

Tá ið Jesus gekk á foldum og vildi læra fólkið, talaði hann ofta í líknilsum, og mangan tók hann dømi úr natúruni, so tað vilja vit eisini gera her.

Ódnin leikaði í, og nógv trø í skóginum kvettust av. Ein tjúkkur eikibulur kom rekandi oman eftir ánni. Longri niðri sá eikin nøkur sev og spurdi tey undrandi: „Hvussu ber tað til, at tit standa óskalað har, meðan eg, sum eri so stór og sterk, kvettist av?"

„Vit standa óskalað, av tí at vit boyggja okkum fyri vindinum, meðan tú stendur so stinn og fatt. Tann, sum er eyðmjúkur, verður standandi."

Lívið er ikki altíð so lætt og einfalt. Fólk kunnu niðurgera okkum og traðka á okkum. Tá skulu vit vera sum grasstráið. Tá traðkað verður á tað, leggur tað seg niður, men so letur tað sevjuna spenna ígjøgnum seg og reisist aftur. Vit skulu í eyðmýkt biðja til Harrans, og tá eiga vit lyftið: „Tá skalt Tú í Himli hoyra bøn og eyðmjúku ákallan teirra og lata teir fáa rætt teirra." 1. Kong. 8,45 V.D.

Tveir froskar gingu gjøgnum túnið á einum bóndagarði. Ein sera stór mjólkarspann stóð har, tí gentan hevði verið og mjólkað fyrr á morgni. Báðir froskarnir hoppaðu upp á kantin á spannini og ætlaðu at fáa sær ein mjólkarsopa. Men teir toygdu seg ov langt og fóru eftir høvdinum niður í mjólkina. Ov langt var at leypa upp á kantin aftur. Annar froskurin segði: „Her er eingin vón. Eg lati meg bara detta niður á botn, tí eg doyggi kortini. Hin froskurin segði: „Nei, eg ætli mær at stríðast sum longst. Eg svimji, til eg ikki orki longur." Hann svam og svam, og brádliga merkti hann, at hann hevði fast undir fótum. Við svimjingini hevði hann pískað róman, so at hann nú sat á einum smørklumpi. So leyp hann upp og var bjargaður.

Lat ikki vónloysi vinna á tær, møguleikar eru fyri framman. Tosa við Harran um støðu tína.

Asbjørn Kvalbein hevði eina andakt á Pottemakerens Hus, har hann segði frá einum ríkmanni í Amerika, sum hevði stórt

virki og alt, sum lættir um lívið og ger tað hugnaligt. So kom stóra bankakreppan har yviri, og maðurin misti alt, virkið, húsini og familjuna. Hann gekk og válaði heimleysur um í gøtunum og fall til drukk. Ein dagin leitaði hann sær oman í fjøruna. Hann ætlaði sær at vassa útí og gera enda á sær.

Sum hann gongur eftir sandinum, sær hann okkurt, sum glitrar so blankt. Hann bukkar seg niður og tekur tað upp. Tað er ein lítil skel, sum er so tunn, so tunn. Bilsin hyggur hann at henni. Hvussu man tað bera til, at hon, sum hevur livað niðri á havsins botni, er óskalað, eftir at havsins aldur hava tveitt hana higar og hagar, til hon at enda skolaði upp her. Sum hann stóð og hugdi upp á hetta tunna undrið, skilti hann alt í einum samanhangin. Skelin lá bara still og læt seg bera av aldunum.

Tá tók maðurin avgerðina at reisa seg upp úr vesaldóminum og byrja av nýggjum. – Fellur tú, verð ikki liggjandi, reis teg og byrja av nýggjum. Bið Harran hjálpa tær og styrkja og signa teg.

*Effie Campbell*

Uttan umvending og nýtt lív í Kristusi er tað ógjørligt at skilja tíðina. Vit vita ikki so frægt sum, hvaðani vit koma, hvørji vit eru, ella hvar leiðin liggur.

*e.c.* ums.

Ein bygdarkona, sum búði í Havn, lá at doyggja. Hon lá við ongum viti. Maður hennara sat við songarstokkin. Tá hoyrir hann alt í einum, at hon lesur upp eitt vers, sum hon hevði lært sum ung:

*Djevel, du begærer af mig.*
*Jeg har dig slet intet at give,*
*tag du dit og pak du dig*
*til Helvedet evigt at blive.*
*Du har forspilt dit Himmerig.*

*e.c.*

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 30. jan. | **Tekstur:** | Matt. 5,1; 7,1–6 + 12 Mark 6,30–31 | **Bíbliuorð:** | Matt. 7,12 |
| 6. febr. | **Tekstur:** | 1 Sám. 9,2+15–17+21–23; 10,1+5–10; 11,15; 13,9–14 | **Bíbliuorð:** | 1. Sám. 3,9 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




Nr. 4 *13. februar 2022* 82. árg.

# Eyðmýkt, samkensla, miskunn, kærleiki

Í einari talu segði Arne Borgersen nakað soleiðis: „Í Jóh. 11,40 stendur: „Segði eg tær ikki, at um tú trýrt, skalt tú síggja dýrd Guds?“ Tað er Jesus, sum sigur hetta og gevur hetta veldiga lyftið.

Eg brúki nógva tíð at biðja, og eg havi eisini arbeitt við rúsmisbrúkarum. Mínar royndir eru, at tá ið tú ert eyðmjúkur og sýnir samkenslu, miskunn og kærleika, tá brýtur bønarsvarið ígjøgnum.

Fyri nógvum, nógvum árum síðani arbeiddi eg við einum manni, sum var rúsevnismisbrúkari og var ógvuliga langt úti. Vit fingu eitt tætt samstarv, og maðurin varð fullkomiliga loystur frá rúsevnum. Hann fekk eitt gott familjulív, og vit hildu sambandið við líka. Nógv ár gingu, og maðurin var púra „turrur“. So ein dagin ringir konan til mín og sigur, at tað hevur ikki gingið so væl við hjúnalagnum, og nú er maðurin rýmdur av húsinum, og hann segði, at nú fór hann inn til býin at útvega sær rúsevnir.

Eg bleiv so ómetaliga keddur, at eg fór at gráta. Hvussu kundi hann finna upp á hetta eftir at hava smakkað Guds náði og góðsku? Eg fór út í skógin, har eg havi eitt bønarstað. Eg rópti hart til Gud um hjálp. Nakrar tímar seinni ringdi konan og segði, at nú var maðurin komin heim aftur uttan at hava tikið rúsevnir.

Bøn, eyðmjúkleiki og samkensla eru av stórum týdningi. Gud er góður og trúfastur.

# Alt er ikki, sum tað tykist

Tá ið vit hugsa um annaðhvørt at mótmæla móti onkrum – ella á hinari síðuni at vísa á Kristus og siga, hvør ið Hann er – so eru torførar tíðir eitt gott høvi hjá okkum Jesus-trúgvandi. Eg kom í hesum sambandi at hugsa um frásagnirnar hjá Corrie ten Boom úr Ravensbrück týningarleguni: 130.000 fangar vóru stúgvaðir saman har – meginparturin kvinnur. Umleið 90.000 doyðu í hesi legu.

Boom-familjan var ein kristin, hálendsk urmakaraætt, sum fjaldi jødar. Tá ið ein maður slatraði um tey, var húskið sett í týningarlegu hjá nasistunum. Corrie kom til Ravensbrück saman við systur síni Betsie. Tær búðu har saman við uml. 700 kvinnum í einari barakk, sum var ætlað til 200. Har var so fult av loppum, at fangavaktirnar als ikki komu inn í barakkina.

Hvat er so at gera? Skuldu tær mótmæla móti viðurskiftunum og loppunum? Ella skuldu tær peika á Kristus og siga, hvør ið Hann er? Tær valdu tað seinna. Tær takkaðu Gudi fyri loppurnar, tí loppurnar hildu fangavaktirnar burtur – og tískil kundu tær halda bíbliutíma hvørt kvøld, og nógv komu til trúgv á Jesus.

Corrie sigur: „**Tú fert ongantíð at skilja, at Kristus er alt, sum tær TØRVAR – fyrr enn Kristus er alt, sum tú HEVUR eftir.**“

Um fortíðina sigur hon: „**Hetta er frágreiðingin um fortíð okkara: Hvør einasta uppliving í lívsins skúla, sum Gud loyvir – hvørt einasta menniskja Gud sendir á veg okkara – er hin fullkomna fyrireiking til ta framtíð, sum bara Hann kennir.**“

Og at enda sigur Corrie: „Hyggur tú at verðini, gerst tú ørkymlað. Hyggur tú at tær sjálvari, gerst tú tunglynt. Hyggur tú upp á Gud, finnur tú hvílu.“

Betsie doyði í týningarleguni fáar dagar, áðrenn frælsisstundin kom. Corrie doyði 15. apríl 1983 – 93 ára gomul. Hon hevur skrivað fleiri bøkur, m.a. „Skjulestedet“, sum varð gjørd til film. Nógvar kvinnur í Ravensbrück funnu lívið í Kristusi, av tí at tað vóru tvær kvinnur, sum skiltu, at har tað einki nyttar at mótmæla, har kundu tær peika á Kristus og siga, hvat Hann er førur fyri og hvat, ið tú eigur í Honum.

Sjálvt loppurnar gjørdust góðir medarbeiðarar hjá Corrie og Betsie. Ja, alt er ikki, sum tað tykist. Loppur, sum vanliga eru ein plága, blivu til stóra signing. Harrin veit, hvat ið Hann ger.

*Effie Campbell* umsetti.

# MINNIST TEY GLOYMDU!

*„…og verjið mál einkjunnar.“ Jes.1,17.*

*Lurta eftir hesum orðum: „Ein rein og lýtaleys gudsdýrkan fyri Guði og faðirinum er hetta: at vitja faðirleys og einkjur í trongd teirra…“ Ják.1,27.*

Hetta er kanska tað kallið, tú hevur leitað eftir! Einasta førleika, tær nýtist, er minnið um, hvussu tað kennist at vera „settur uttanfyri“, ikki at sleppa upp í part – og at hava slíka samkenslu við menniskjum, at tú ætlar tær at gera okkurt við hetta. Hetta brævið er frá einari konu, hvørs maður doyði. Hon kallar tað „Støðan um einkjustøðuna“.

„Fyrst lammilsi, síðani skundur og stákan. Túsund og eitt ting skulu gerast. Eitt ótal av deyðsváttanum og ymiskum pappírum skulu váttast. Vinirnir vísa slíka umsorgan. Familjan stuðlar kærleiksfult. Tú hevur úr at gera.

Men um náttina slært og bankar tú niður í ta tómu síðuna av songini í sorg. At enda letur tú eyguni aftur. Tú blakar tannbustina og inniskógvarnar í ruskílatið. Tey hevði tú heim aftur við tær av sjúkrahúsinum í einum plastposa.

Tú tømir skápið og gevur øðrum øll klæði hansara. Tað er so ønskriligt, at tú fatar tað ikki. Hvør klædningur minnir teg um eitt serstakt høvi ella eina serstaka tíð, tit høvdu saman. Eitt ár gongur. Tú ert um at signa. So kemur hin øgiligi smeiturin! Vinir tínir halda ein føðingardag – øll koma sum pør – tú ert ikki bjóðað, av tí at so hevði tú verið „triðjahjól“. Summar konur síggja teg enntá sum eina hóttan.

Minnist okkum. Gevist at viðfara okkum sum eyka viðføri. Vit hava upplivað tað ringasta, og okkum tørvar vinir.“ Undirskrivað – Hin Gloymda. Guds barn, hugsa um tann munin, tú kanst gera í dag í lívinum hjá einum øðrum menniskja, um bert tú ert villig at minnast „tey gloymdu“ og torir at rætta teimum hondina!

*„…et Ord til Dagen“ – Effie Campbell* umsetti.

# Tað hevur einki at siga, hvussu tú biður – bara tú biður

1. Tú situr: Neh. 1,4: „Tá ið eg hoyrdi hesi tíðindi, **settist eg niður** at gráta og syrgdi í fleiri samfeldar dagar; og eg fastaði **og bað** til Guds á himni.“
2. Tú stendur: Mark. 11,25: „Og tá ið tit **standa og halda bøn**…“
3. Tú gongur: 2. Kongab. 4,35: „So **fór** hann niður aftur **og gekk** eina ferð **aftur og fram** í húsinum, fór síðani upp aftur …“
4. Tú kastar teg til jarðar: 2. Mós. 34,8: „Tá **lútaði** (kastaði seg til jarðar V.D.). Móses alt í einum **til jarðar**, tilbað…“
5. Tú lyftir hendurnar upp: 1. Tim. 2,8: „Eg vil tá, at menninir skulu **halda bøn soleiðis**, at teir á einum og hvørjum staði **lyfta upp heilagum hondum** …“
6. Tú fellur á knæ: Luk. 22,41: „Hann fór frá teimum okkurt um eitt steinkast og **legðist á knæ og bað**.“
7. Tú leggur teg fram á grúgvu (tú fellur niður á andlit títt) Matt. 26,39: „Hann fór eitt sindur burtur frá teimum, **legði seg fram eftir grúgvu**, bað og segði …“

*Effie Campbell* umsetti.

---

Leonid Bresjnev varð einaferð spurdur, hví hann ikki gav øllum jødum í Russlandi loyvi at flyta til Ísraels. Hann svaraði: „Um allir jødar fara, missir Russland sín heila.“ – Og tað kundi hann saktans siga. Uml. 200 jødar hava fingið nobelheiðurslønina, hóast teir bara eru uml. 0,2% av heimsins íbúgvum.

---

Kristusar frelsaragerningur er største solo-avrik, sum nakrantíð er gjørt. *e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 13. febr. | **Tekstur:** | 1 Sám. 16,1-3 + 6-13 + 19-23 | **Bíbliuorð:** | 1 Sám. 16,7b |
| 20. febr. | **Tekstur:** | 1 Sám. 17,4–11 + 32–45 + 48–50a | **Bíbliuorð:** | Sl. 37,5 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74